HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Í hoyring

22. juni 2018
Mál: 16/01015-43
Viðgjørt: Hilmar Høgenni

**Til ummælis:**

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum** (Yvirtøka av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki) og

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om stedbestemt information**

- Udkast til anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om stedbestemt information
- Resumé af den kongelige anordnings indhold

**Freistin at lata inn ummæli er týsdagin 7. august 2018.**

Landsstýrið hevur gjørt av at yvirtaka málsøkið kort- og landmátingarmyndugleiki. Landsstýrið ynskir at yvirtaka økið, tí at økið hevur so tætt tilknýti til onnur økir, sum eru á føroyskum hondum og eisini er týdningarmikil partur av samleika føroyinga.

Kort- og landmátingarøkið er í dag stýrt av hesum donsku lógunum, sum eru lýstar í Føroyum:

- Lov nr. 82 af 31. marts 1928 om Geodætisk Institut
- Lov nr. 318 af 16. december 1931 angående Geodætisk Instituts trigonometriske stationer m.v.

Áðrenn yvirtøkan verður framd í verki, verða hesar lógir eftir ætlan tiknar av, og í staðin kemur í gildi í Føroyum anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om stedbestemt information.

Ætlanin er formliga at yvirtaka málsøkið kort- og landmátingarmyndugleiki sum føroyskt sermál. Við hesum taka føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki. Málsøkið fevnir eisini um sjókort og sjómátingar.

Uppskotini eru eisini løgd á heimasíðuna hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum www.himr.fo.

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo